# ítróttur

Nr. 71 • hósdagur • 15. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Roy Keane tøkur móti føroyingum

**Írska fótbóltslandsliðið, ið føroyingar skulu dystast við seinni í ár, hevur fingið kærkomnan styrk. Liðskiparin hjá enska stórfelagnum Manchester United, Roy Keane, hevur boðað frá, at hann aftur er tøkur á írska landsliðnum**


FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Uttan iva besti írski leikarin seinnu mongu árini, Roy Keane, valdi undir heimsmeistarakappingini í fótbólti í Japan og Korea á sumri í 2002 at fara úr írska landsliðshópinum eftir ein samanbrest við táverandi venjaran Mick McCarthy. Keane, ið eisini var liðskipari hjá Írlandi, var ónøgdur við umstøðurnar og helt írska fótbóltssambandið verða óprofessionelt.

### Deildar meiningar

Longu fyri meiri enn einum ári síðani samráddust núverandi venjarin hjá írum, Brian Kerr, Roy Keane sjálvur og venjarin hjá Manchester United, Alex Ferguson, um eitt møguligt come-back, men valdu at bíða eina tíð, millum annað tí at Keane hevði so nógvar skaðar at dragast við. Nú eru teir so komnir ásamt um, at tíðin er búgvin til, at ein av heimsins bestu miðvallaleikarum kemur aftur á írska landsliðið.

At Keane kemur aftur á landsliðið, fer óivað at hava við sær, at nógv kjak verður um avgerðina. Tá ið miðvallastjørnan segði landsliðnum farvæl undir HM í 2002, vóru meiningarnar ógvuliga deildar millum írska fólkið. Nógv kallaðu hann ein landasvíkjara, meðan onnur stuðlaðu honum. Tað eru tí heldur ikki óvæntað eisini deildar meiningar um, hvat fólk halda um, at Keane nú vendur aftur. Navnframi Frank Stapleton, ið hevur leikt í álopinum á bæði írska landsliðnum og hjá Manchester United, sigur, at tað fer óivað at deila trúgvu áskoðarafjøldina hjá írum í tveir bólkar, men hann leggur afturat, at Keane er ein kærkomin styrkur til írska miðvøllin. Írski landsliðsvenjarin, Brian Kerr, er sjálvsagt ovurfegin um hava Roy Keane við aftur, men tað eru tó nakrir av landsliðsleikarunum, ið neyvan eru so fegnir. Millum annað hevur fyrrverandi Liverpool- og núverandi Sunderland leikarin, Jason McAteer, sagt, at hann aldrin fór at fyrigeva Roy Keane, at hann vendi írska landsliðnum bakið.



*Roy Keane, sum her er avmyndaður í dysti fyri Manchester United móti Aston Villa, verður nú aftur við á írska landsliðnum, sum seinni í ár fær vitjan av føroyska landsliðnum í Dublin*

### Trupul uppgáva hjá føroyingum

Tá ið føroyingar skulu á vøllin á Landsdowne Road í Dublin seinni í ár, er tað ein ógvuliga trupul uppgáva, ið stendur fyri framman. Írska landsliðið hevur nógvar stjørnur í hópinum, og úrslitini seinastu mánaðirnar tala fyri seg. Millum annað leiktu teir javnt, 0-0, móti heimsmeistarunum úr Brasil í Dublin fyrr í vetur, og seinni hava teir bast kekkum, ið annars høvdu verið ósigraðir í rættuliga langa tíð.

Millum kendastu leikararnar í írska landsliðshópinum eru, umframt Roy Keane, eisini Damien Duff úr Chelsea, John O'Shea úr Manchester United, Steven Carr og Robbie Keane úr Tottenham, Steve Finnan úr Liverpool og málverjin Shay Given úr Newcastle. Hetta eru øll kend nøvn millum fótbóltsáhugaðar føroyingar, og eingin ivi er um, at tað verður ein uppliving hjá føroyska landsliðnum at leika móti hesum monnum.

# Endaligu talvúrslitini frá FM

**Av misgávum komu endaligu stigatalvurnar frá FM í talv ikki við í blaðið í gjár, og eru tær tískil at síggja her á síðuni**

Gunnar Joensen vann eldrabólkin í FM-telvingini, og hjá unglingunum gjørdist Helgi Dam Ziska føroyameistari.

Sum vit hava nevnt fyrr í vikuni, so endaði FM-kappingin í talvi við, at Martin Poulsen aftur í ár er føroyameistari.

Tað var tó ikki bara í landsliðsbólkinum, at kappast varð seinastu viku.

Fýra aðrir bólkar vóru eisini á skránni, og í øllm fýra førum gjørdist talan um ein greiðan vinnara, soleiðis at skilja, at tað ikki gjørdist neyðugt við umdysti fyri at avgera nakað.

Í 1. bólki – t.e. bólkurin undir landsliðsbólkinum, gjørdist Finnbjørn Vang vinnari. Hann tapti annars næsta talvið hjá sær, men seinastu sjey umførini fekk hann seks stig, og yvirhálaði sostatt í seinastu løtu Eyðálv Johannesen, tá hesin einki fekk burtur úr teimum báðum seinastu umførunum.

Í 2. bólki fekk Wenzel Højgaard 6,5 stig burtur úr sínum átta dystum, og hetta var heilt stig meira enn næstu menninir, sum vóru Sigurð B. Justinussen, Jógvan Joensen, Rani Baldursson og Rógvi Mortensen.

Unglingameistari í ár gjørdist Helgi Dam Ziska. Hann misti bert hálvt stig alla kappingina, og hetta var ikki fyrr enn í seinasta umfarinum, so gullmerkið varð her tryggjað í góðari tíð.

Og hjá eldrabólkinum vann Gunnar Joensen. Hann fekk trý stig fyri síni fýra talv, og tað megnaði eingin av kappingarneytunum. Nummar tvey gjørdust Justinus Hansen og Helgi Joensen, sum fingu hálvtriðja stig hvør.

**tn**

## Endaliga støðan í FM-kappingini

| | | |
|---|---|---|
| **Landsliðsbólkurin** | | |
| 1 | Martin Poulsen | 6,5 |
| 2 | Hans Kristian Simonsen | 6,0 |
| 2 | Olaf Berg | 6,0 |
| 4 | IM John Rødgaard | 5,5 |
| 5 | Bogi Ziska | 5,0 |
| 6 | Torkil Nielsen | 4,0 |
| 6 | Carl Eli Nolsøe Samuelsen | 4,0 |
| 8 | Jens Kristian Hansen | 3,0 |
| 8 | Steintór Rasmussen | 3,0 |
| 10 | Rani Nolsøe | 2,0 |
| **1. bólkur** | | |
| 1 | Finnbjørn Vang | 7,0 |
| 2 | Eyðálvur Johannesen | 6,5 |
| 3 | Bernard Thomsen | 6,0 |
| 4 | Jákup á Rógvu Andreasen | 5,0 |
| 5 | Andreas Andreasen | 4,5 |
| 6 | Bernhard Augustinussen | 3,5 |
| 6 | Ingolf Gaard | 3,5 |
| 6 | Jógvan Næs | 3,5 |
| 9 | Samson Højgaard | 3,0 |
| 10 | Andrias Ziska | 2,5 |
| **2. bólkur** | | |
| 1 | Wenzel Højgaard | 6,5 |
| 2 | Sigurð B. Justinussen | 5,5 |
| 2 | Jógvan Joensen | 5,5 |
| 2 | Rani Baldursson | 5,5 |
| 2 | Rógvi Mortensen | 5,5 |
| 6 | Herluf Mortensen | 5,0 |
| 7 | Eyðun Lamhauge | 4,5 |
| 7 | Jón Mikkelsen | 4,5 |
| 7 | Jónfinn Thomsen | 4,5 |
| 7 | Gutti Petersen | 4,5 |
| 7 | Sjúrður Thorsteinsson | 4,5 |
| 12 | Karl louis Johansen | 4,0 |
| 12 | Sonni Nielsen | 4,0 |
| 12 | Heri Christoffersen | 4,0 |
| 12 | Martin Jóanesarson | 4,0 |
| 12 | Jón Magnus Joensen | 4,0 |
| 17 | Jákup Joensen | 3,5 |
| 17 | Petur Hans Hansen | 3,5 |
| 17 | Oddmar Andreasen | 3,5 |
| 17 | Kaj A. Jacobsen | 3,5 |
| 21 | Vagn Heldarskarð | 3,0 |
| 21 | Rógvi Hansen | 3,0 |
| 21 | Bjørn E. Thomsen | 3,0 |
| 24 | Hjalmar Joensen | 2,5 |
| 25 | Heri Thomsen | 2,0 |
| 26 | Oddur Simonsen | 0,5 |
| 27 | Símun Skorastein | 0,0 |
| **Eldra bólkurin** | | |
| 1 | Gunnar Joensen | 3,0 |
| 2 | Justinus Hansen | 2,5 |
| 2 | Helgi Joensen | 2,5 |
| 4 | Jefri Justinussen | 1,5 |
| 5 | Sigurd Joensen | 0,5 |
| **Unglingar** | | |
| 1 | Helgi Dam Ziska | 7,5 |
| 2 | Jón Gregersen | 6,5 |
| 3 | Rógvi Dragaberg | 6,0 |
| 4 | Rógvi Egilstoft Nielsen | 5,5 |
| 5 | Danny Baldursson | 5,0 |
| 5 | Regin Sivertsen | 5,0 |
| 5 | Bogi Hansen | 5,0 |
| 5 | Rú8ni Vørmadal | 5,0 |
| 5 | Andrias Nielsen | 5,0 |
| 5 | Dánjal Petur Jacobsen | 5,0 |
| 11 | Heri Thomsen | 4,5 |
| 11 | Herborg Hansen | 4,5 |
| 11 | Margeir Berg | 4,5 |
| 11 | Arnold Jakobsen | 4,5 |
| 15 | Eilif Arge | 4,0 |
| 15 | Jógvan Juul Olsen | 4,0 |
| 15 | Hjalti T. Jógvansson | 4,0 |
| 15 | Oddur Højgaard | 4,0 |
| 15 | Heiðrikkur Jacobsen | 4,0 |
| 15 | Andrias W. Danielsen | 4,0 |
| 15 | Eli N. Leifsson | 4,0 |
| 22 | Fróði Gregersen | 3,5 |
| 22 | Christoffur Dam | 3,5 |
| 22 | Jón Olsen | 3,5 |
| 22 | Olaf R. Samuelsen | 3,5 |
| 26 | Jaspur Enghamar | 3,0 |
| 26 | Fríða við Streym | 3,0 |
| 26 | Høgni Egilstoft Nielsen | 3,0 |
| 29 | Jógvan Emil Joensen | 2,5 |
| 29 | Dánjal Petur Nielsen | 2,5 |
| 29 | Karl Weihe Viðstein | 2,5 |
| 32 | Hálvdan B. Dalsgarð | 2,0 |
| 33 | Sveinur Bjarkason | 1,0 |
| 33 | Bárður Jónnson Stórá | 1,0 |









Klubbadansur
Leygarkvøldið spælir
BRIM
úr Vestmanna
HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Koyrt verður leygarkvøld:
Vágaleiðin (tlf. 217753)
• Úr Vágunum — bert eftir avtalu
• Tórshavn - Vágar — kl. 04.30
Vestmannaleiðin (tlf. 217752)
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
Nú fæst eisini Talutíðarkkort
Føroya Tele Kall
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234



fk Matseðilin
Hósdagin 15. apríl:
Høsnarungabringa
Fríggjadagin 16. apríl
Kotelettir
Leygardagin 17. apríl
Oksasteik
Mánadagin 19. apríl
Gjørda haru
Týsdagin 20. apríl
Fiskafrikadellir
Mikudagin 21. apríl
Grýturætt
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 30,00
Matstovan í Hoyvík

club KAGGIN
Hóskvøldið
Gó Gó Blúes
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Fríggjakvøldið
Audio
Leygarkvøldið
Audio
www.kaggin.fo



felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
UNITED
Leygardagin 17. apríl kl. 20
BINGO
Ókeypis atgongd í kjallaranum fríggjakvøld og leygarkvøld



BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67